Anja Clementsen

niðan Horn 32

FO-700 Klaksvík

Tlf: +298 23 70 94

Anja.clementsen@gmail.com

Viðmerkingar til Almennu viðmerkingarnar til uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt (býti millum land og kommunu, tilboð og aldursbólkar, námsfrøðilig og sernámsfrøðilig ráðgeving).

Mínir viðmerkingar eru út frá mínum royndum í 10 ár, sum kommunalur námsfrøðiligur ráðgevi. Viðmerkingarnar snúgva seg um §5 og §3 og eru skrivaðar við reyðari skrift.

Tá talan er um ábyrdarbýti millum land og kommunu, er tað áhugavert, at ikki verður hugt nærri at §5 í Løgtingslógini um dagstovnar og dagrøkt stk. 3, sum verður óbroyt í hesum uppskotinum.

> *§ 5. Børn við serligum tørvi hava rætt til tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt á jøvnum føti við onnur børn, sum búgva í kommununi, sambært § 3.*
>
> *Stk. 2. Til børn við serligum tørvi verða veittar nøktandi hølisumstøður og námsfrøðilig tilboð.*
>
> *Stk. 3. Í ivamálum um tilboð skal veitast sambært hesi lóg, skal málið ávísast víðari til Almannaverkið, ið tekur avgerð.*

Tað er serliga áhugavert at Almannaverki framhaldani skal taka avgerð hvørt eitt tilboð skal veitast sambært hesi lóg ella ikki.

Í uppskotinum stendur í punkt 7:

> *"§ 5 a. Kommunurnar skulu sjálvar ella í samstarvi við aðrar kommunur veita námsfrøðiliga ráðgeving til dagstovnar. Ráðgevingin fevnir um námsfrøðiliga vegleiðing, inklusjón og fyribyrgjandi tiltøk, sum hava til endamáls at stuðla starvsfólkum og tryggja trivnað og menning hjá børnum.*

Tá kommunala ráðgevingin skal fevna um vegleiðing, inklusjón og fyribyrgjandi tiltøk, sum hava til endamáls at stuðla starvsfólkum og tryggja trivnað og menning hjá børnum, er áhugavert at leggja sær í geyma at kommunurnar ikki skulu hava ráðgevarar, sum akademiskt eru betri fyri at vegleiða vælútbúnum námsfrøðingum við bæði profesionsbachelor og bachelor í námsfrøði, sum eru fullfør at arbeiða inkluderandi, fyribyrgjandi og skapa trivnað og menning hjá børnum.

At vegleiða onnur krevur eina teoretiska/analytiska eftirútbúgving, sum kvalifiserar til meira fløktar uppgávur innan menning, verkætlanarleiðslu og ráðgeving.

At arbeiða fyribyrgjandi, sum kommunalur ráðgevi, er at arbeiða sernámsfrøðiligt og tað má henda beinanvegin og ikki bíða til landsins ráðgevarar koma uppí eitt mál. Sernámsfrøði er fyribyrgjandi arbeiði, tað fyribyrgjandi liggur í at fyribyrgja, at barnið kemur í keðiligar støður og at fyribyrgja at barni er trupulleikin, ella at barnið skal útgreinast. Hetta arbeiði krevur holla vitan innan sernámsfrøði og at skilja atferðin hjá barninum, sum eitt tekin um umstøðurnar um barnið, heldur enn sum eitt tekin um okkurt íborið barninum.

At seta fyribyrgjandi tiltøk í verk er eisini at síggja málið frá nýggjum sjónahornum og seta seg inn í nýggj sjónarmið.

Alt hetta er sernámsfrøði og kann tí ikki einans skilgreinast sum námsfrøði.

Í uppskotinum stendur í punkt 7:

> *§ 5 a. Stk. 2. Landið veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving eftir áheitan frá kommunalu ráðgevingini, tá talan er um børn, ið hava serligan ella samansettan tørv.*

Tá landið veitir sernámsfrøði eftir áheitan frá ráðgevingini, krevur tað, at kommunala ráðgevin hevur innlit í og er partur av allari tilgongdini hjá øllum børnum, sum eru í truplari støðu. Her fær kommunala ráðgevingin meiri fyrisitingarligar uppgávur og kann avlasta og stuðla dagstovna leiðslurnar, tá tað kemur til § 5 í dagstovnalógini.

Í uppskotinum stendur í punkt 7:

> *§ 5 a. Stk. 3. Landstýrissfólkið ásetur við kunngerð nærri reglur um samskipan millum námsfrøðiligu ráðgevingina sambært stk. 1 og sernámsfrøðiligu ráðgevingina sambært stk. 2, herundir reglur um upplýsingargongd og samstarv."*

Tá landstýrisfólkið ásetur nærri reglur um samskipan, samstarv og upplýsingargongd millum kommunalu ráðgevingina sambært stk. 1 ráðgevingina hjá landinum sambært

stk. 2, tryggja vit okkum vónandi eitt meiri skipað samstarv enn tað, sum er í dag, har alt samstarv millum dagstovn og Sernám er uttanum kommunalu ráðgevingina.

Í Kapittul 1. Almennar viðmerkingar punt 1.3 í seinasta reglubrotið á s. 7 stendur skrivað:

> *Sernámsfrøðiliga ráðgevingin hjá landinum verður veitt av fakfólki við serútbúgving innan m.a. sálarfrøði, talipedagogikki, ergo- og fysioterapi og sernámsfrøði. Hesi fakøkini eru somuleiðis ein natúrlig ábending um, hvar markamótini millum námsfrøðiliga og sernámsfrøðiliga ráðgeving liggja. Kommunurnar hava í høvuðsheitum námsfrøðingar sum hægstu útbúgving, meðan landsins fakligu eindir hava tann tvørfakliga serkunnleikan, sum krevst, tá tørvur er á útgreiningum, málsligum og motoriskum kanningum, sálarfrøðiligum metingum og serligum tvørfakligum tiltøkum. Hetta ger greið faklig markamót og tryggjar, at bæði kommunur og land hava vælskipaðar leiklutir og skyldur.*

Tað er hugstoytt at tørvur er á at áseta við lóg, hvørt kommunurnar í høvuðsheitum hava námsfrøðingar sum hægstu útbúgving. Har stendur í høvuðsheitum, sum so kann tulkast. Tað er púra vist, at tað skal vera eitt starvsfólk við námsfrøðiligum grundarlagið, tvs siga at ein jarðarmóður, sjúkrarøktarfrøðingur, lærari ella bilsmiður ikki skal í slíkt starv. Tað er eisini púra vist, at tað má vera ein, sum akademiskt er betri fyri við t.d. námsfrøðilig kadidat, enn teir væl útbúni námsfrøðingarnar, sum biðja um ráðgeving og hjálp í fyrstu syfti frá kommunalu ráðgevanum.

Tað er eyðsætt, neyðugt og tørvur á at fáa staðfest og fáa leiðreglur fyri nær ráðgevingin liggur hjá kommununum og nær tær liggja hjá landinum. Hetta nýtist tó ikki at hava við sær at kommunalu ráðgevararnar eru fakliga verri fyri enn ráðgevarnar hjá landinum.

Í kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur stendur at

> *Sernám røkir longu sernámsfrøðiliga ráðgeving fyri dagstovnaøkið sambært verandi praksis og hevur fakliga orku og skipanir til tess. Eingin eyka útreiðsla verður tí væntað hjá Sernámi.*

At lógaruppskotið væntandi ikki hevur við sær fíggjarligar avleiðingar fyri landið, er ikki nøgdandi. Sernám hevur, sum er, ikki nóg nógva orku at røkka nóg skjótt og væl út á dagstovnaøki. Tað er lang bíðitíð fleiri mánaðar til eitt mál verður sett á skrá, og enn longri til samband er millum Sernám og stovnur/foreldur. Sernám hevur ein ergoterapeutur og ein fysioterapeutur í starv og har er uppaftur longri bíðitíð til at fáa ráðgeving frá teimum.